


Gongdin í oljuprísinum seinastu dagarnar.

# Oljuprísurin hækkar enn meir í morgun

**Jógvan Hugo Gardar**

28.08.2015 - 09:03

Oljan.fo

Myndin omanfyri talar fyri seg. Ikki síðani fíggjarkreppuna í 2009 hevur oljuprísurin hækka so nógv eftir einum degi. Oljuprísurin kúvendi seint í gjár, og fór at hækka skjótt. Í gjáramorgunin lá prísurin um 43 dollarar, men hækkaði uppí 47,50 dollara seint í gjár.

Í morgun sær út til at oljuprísurin heldur fram at hækka, bæði fyri amerikansku léttoljuna WTI og norðsjóvaroljuna Brent. Í løtuni verður Brent-oljan seld fyri 47,78 dollarar fyri fatið.

*LES EISINI: Oljuprísurin kúvendi í kvøld*